Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	5. des. 2024
Mál nr.:	23/20058-3
Málsviðgjørt:	Terji Beder
Ummælistíð:	4 vikur
Eftirkannað:	Lógartænastan dagfestir

Uppskot til

Kunngerð um broyting í kunngerð um útbúgving av fólkaskúlalærarum

§ 1

Í kunngerð nr. 101 frá 17. juni 2021 um útbúgving av fólkaskúlalærarum, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 13 verður orðað soleiðis:
"**§ 13.** Landsstýrismaðurin setur eitt samstarvsráð fyri útbúgvingina til fólkaskúlalærara. Endamálið við ráðnum er at fremja samstarv millum teir partar, ið varða av útbúgvingini til fólkaskúlalærara og av fólkaskúlalærarayrkinum sum heild.
Stk. 2. Ráðið verður mannað við:
1) einum umboði, ið landsstýrismaðurin velur,
2) einum umboðið, ið Kommunufelagið tilnevnir,
3) einum umboðið, ið Fróðskaparsetur Føroya tilnevnir,
4) einum umboði, ið Føroya Lærarafelag tilnevnir,
5) einum umboði, ið Fólkaskúlaráðið tilnevnir,
6) einum umboði, ið Undirvísingarstýrið tilnevnir,
7) einum umboði, ið NÁM tilnevnir, og
8) einum umboði, ið tey læraralesandi velja.

Stk. 3. Partarnir tilnevna, so vítt møguligt, ein mann og eina kvinnu.
Stk. 4. Landsstýrismaðurin velur formann og skrivara í ráðnum. Ráðið ger sjálvt sína starvsskipan."

2. Í § 23 verður sum stk. 3 sett:
"*Stk. 4.* Ráðið verður sett fyri eitt fýra ára tíðarskeið. Ráðið ella einstakir ráðslimir kunnu vera endursettir."

§ 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, dagfesting

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen